

## Trúnarvingabók útkomin

Fyrr í ár vóru teir tríggir norðurlendsku trúnarvingarnir, Victoria krúnprinsessa og krúnprinsarnir Fríðrikur og Hákun, á ferð í Grønlandi og aðrastaðni norðuri í póløkinum, og nú er komin út bók, sum tey og nakrir granskarar, sum ferðaðust saman við teimum, hava skrivað um ferðina. Í bókini lýsa tey trý og granskararnir umhvørvið í Grønlandi og á Svalbard, avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum har, og hvussu umráðandi tað er at røkta umhvørvið. Kofi Annan, sum var aðalskrivari í ST frá 1997 til 2006, hevur skrivað fororðini í bókini.

## Villy heldur enn Helle

Fleiri av teimum, sum valdu Sosialdemokratarnar á kommunuvalinum í Danmark fyrr í vikuni, høvdu ikki valt flokkin, um talan var um val til Fólkatingið. Ein kanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Berlingske Tidende, vísir, at ein triðingur av teimum kommunalu veljarunum hjá Sosialdemokratunum høvdu ikki valt flokkin, um fólkatingsval var nú. Ístaðin fyri høvdu tey flestu valt Sosialistiska Fólkaflokkin, og nøkur høvdu valt Konservativa Fólkaflokkin ella Danska Fólkaflokkin. Á kommunuvalinum í vikuni fingu Sosialdemokratarnir góð 30 prosent av atkvøðunum.

# Klárt at fara undir Eysturoyar-tunnilin um eitt hálvt ár

EYSTUROYARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal ferð av álvara setast á arbeiðið at gera undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy.

Tað staðfesti Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum fyri Løgtinginum í gjár.

Tað var Rodmund Nielsen, sum hevur sæti á tingi í nakrar dagar, sum fregnaðist hjá landsstýriskvinnuni eftir, hvar málið um Eysturoyartunnilin liggur í løtuni.

Annika Olsen sigur, at Eysturoyartunnulin verður raðfestur rættiliga frammarlaga og í næstu viku verður fundur við allar partar í verkætlanini at samráðast um karmarnar og meginreglurnar fyri loyvinum til partafelagið Skálafjarðartunnilin at fara undir verkætlanina.

Á fundinum er ætlanin at viðgera løgfrøðiligar, fíggjarligar og aðrar spurningar í sambandi við ætlanina.

Samstundis er eitt umboð fyri hvønn flokk á Løgtingið boðið við á fundin.

– Semjast partarnir um meginreglurnar og karmarnar, er ætlanin at fara undir ítøkiligar samráðingar beinanvegin, so at tær kunnu verða lidnar í so góðri tíð, at málið kann verða lagt fyri Løgtingið í vár.

– Tað merkir, at samráðingarnar mugu vera lidnar í februar næsta ár, legði hon afturat.

Hon ivast ikki í, at samráðingarnar fara at enda við eini semju, so at verkætlanin kann gerast veruleiki.

– Hetta er ein verkætlan, sum hevur rættiliga stóran týdning, tí hon fer at binda Føroyar saman og gevur sostatt stórar møguleikar fyri bæði vinnulívi og øðrum møguleikum.

Annika Olsen sigur, at enn dugur hon ikki at siga, nær tað verður klárt at fara undir arbeiðið, tí enn skulu onkrar seismiskar kanningar gerast.

– Men so skjótt avtalan um loyvið er avgreidd næsta vár, ber til at fara undir arbeiðið og sjálv boringin tekur eini trý ár.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna miðjar eftir at fáa eina avtalu um Eysturoyartunnilin í vár og so er klárt at fara undir arbeiðið*

### Kundi farið betri

Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi staðfesti, at Eysturoyartunnilin er einasta samferðsluútbygging, sum loysir seg fíggjarliga og kastar nakað av sær til samfelagið.

– Hetta er ein verkætlan, sum kastar tíggjutals milliónir av sær um árið, segði hon.

Og henni dámdi onki, at tað skuldi vera eitt privat felag, sum skuldi standa fyri verkætlanini.

Ístaðin fyri at vinningurin fer í privatar lummar heldur hon, at avkastið kundi farið í landskassan og verðið brúkt til at fíggja aðrar samferðsluútbyggingar við og í hesum sambandi kundi Sandoyartunnilin komið upp á tal.

Hinvegin staðfesti Tórbjørn Jacobsen, at Tjóðveldið ásannaði, at politiskur meiriluti var ikki fyri hesi ætlanini og tí boygdu tey seg fyri veruleikanum og tóku undir við ætlanini, sum hon nú fyriliggur.

## Heldur fast um at Heilsutrygdin skal til Klaksvíkar

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, staðfestir í dag, at hann heldur fast um avgerðina um, at nýggja Heilsutrygdin skal vera í Klaksvík.

Tað kunngjørdi hann í Løgtinginum í dag.

Hann sigur, at ein orsøk til tað er, at tað fer at gera sítt til eina smidliga skiftistíð frá sjúkrakassanum til heilsutrygdina, tí har eru starvsfólk tøk til størvini.

Sostatt jarðaði hann einaferð fyri allar alt tos um, at stovnurin kortini skal flytast í Sandoynna.

Hann varð eisini spurdur um nakað samband var ímillum Heilsutrygdina og tankan um at flyta Taks úr Saltangará til Klaksvíkar, soleiðis at kabalin verður vend við og at sandoyingar fáa Heilsutrygdina kortini og at klaksvíkingar so fáa Taks afturfyri.

Spurningurin fall tí at Gerhard Lognberg hevur tvíhildið um, at tað varð avtalað í samgonguni, at Heilsutrygdin skuldi vera í Sandoy.

Men hetta avsannaði Aksel V. Johannesen staðiliga.

Hann segði, at Taks var ikki hansara málsøki og at Heilsutrygdin verður í Klaksvík, sama hvørja lagnu Taks annars fær.



*Aksel V. Johannesen staðfestir, at Heilsutrygdin skal vera í Klaksvík*